# Leiðari fyri Mentanarhúsið í Fuglafirði

Søkt verður eftir intiativ- og fantasiríkum leiðara til Mentanarhúsið í Fuglafirði. Leiðarin, ið fer at hava tilvísing til nevnd Fuglafjarðar Sjónleikafelags, skal hava dagligu leiðsluna av húsinum um hendi.

Talan er um fulltíðarstarv, harav nógvir tímar eru uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Lønin verður eftir avtalu.

**Uppgávurnar**
Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt leiðarastarv við nógvum fjølbroyttum uppgávum og við rúm fyri menning og endurnýggjan.

Uppgávurnar eru eitt nú at skipa fyri tiltøkum, at taka ímóti bílegginum av húsinum og at samskipa tiltøkini. Leiðarin stendur fyri samskiftinum úteftir og skal røkja og menna heimasíðuna og ymsar samskiftisprofilar.

Leiðarin skal menna og útbyggja tænastur, tiltøk og útgerð, og skal leiðarin eisini syrgja fyri at húsið er væl røkt.

Í samstarvi við nevnd og bókhaldara røkir leiðarin fíggjarligu skyldu felagsins.

**Krøv til umsøkjaran**
Vit vænta, at tú hevur brennandi áhuga fyri mentan í breiðum høpi og hevur hug at menna eitt virkið hús at vera enn meira virkið og fjølbroytt. Tú hevur fíggjarligt innlit og tev og hevur royndir sum leiðari og samskipari. Tú hevur góð leiðara- og samstarvsevni og arbeiðir væl sjálvstøðugt.

Nevndin tilskilar sær rætt frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.

**Um Mentanarhúsið**
Mentanarhúsið er ogn Fuglafjarðar Sjónleikarafelags. Húsið varð tikið í nýtslu í juli 2002. Húsið er bygt fyri at hýsa alskins mentunartiltøkum, so sum sjónleiki, tónleiki, listaframsýningum, fundum, veitslum, dansi, ráðstevnum o.s.fr. Eini 20 lønt og ólønt fólk eru knýtt at húsinum.

**Missión**
Mentanarhúsið skapar karmar um eitt fjølbroytt úrvæl av mentanarligum tiltøkum – vinnuligum, almennum og privatum.

**Visjón**
At vera fremsti/besti og breiðasti mentanarberi.

Umsóknir við CV skulu sendast til
Fuglafjarðar Sjónleikarafelag
Postsmoga 14
530 Fuglafjørður

Umsóknarfreist er 23. mars kl. 12.

MENTANARHÚSIÐ · KARVATOFTUR 5
FO-530 FUGLAFJØRÐUR · TLF: 234950,
MENTHUS(A)MENTHUS.FO

## Tvingilssøla

**Fríggjadagin 21. Apríl 2009 kl. 13.00** verður á Dómaraskirvstovuni, C. Pløjensgøga 1, 100 Tórshavn hildin tvingilssøla yvir ognina matr.nr. 102a, Søldafjørður (AS nr. 2-1/2009).

Matr.nr. 102a, Søldarfjørður, ið liggur Oman á Sand 15, er ein vinnubygningur og sambært tryggingarskjalinum fyri bygningin er bygda økið 564 m$^2$ í tveimum hæddum. Samlað grundøkið er 2.294m$^2$. Bygningurin hevur verið nýttur til HVS –innlegging, blikksmið, smásølu av jarnvørum og framleiðslu.

**Bygningurin er annars innrættaður soleiðis:**
**Miðhædd:** Trappugongd upp til miðhæddina. Á Miðhæddini er eitt handilshøli, tríggjar skrivstovur, goymslurúm, køkur, musikrúm, vesi og gongd.
**Veghædd:** Ein stór smiðja, garasja og køkur.

Bygningurin er stoyptur og partvís beklæddur, Vindeyguni eru plastikk og og takið er av stáli.

Fyrireikandi tvingsilssfundur verður **týsdagin tann 24. mars 2009 kl. 11.00** í rættarsali fýra, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn.

Tvingsilssølan er umbiðin av Ingi Højgaard adv., v/Mimi Steintórsdóttir, adv.tf., Advokatfelagið við Strond 4, Yvir við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 8800808), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

ADVOKATSKRIVSTOVAN

## TVINGSILSSØLA

Týsdagin, **tann 21. Apríl 2009 kl. 10.00** verður ognin matr. nr. 556, Vágur, við bakaríútgerð seld á tvingsilssølu í Føroya Fútarætti, rættarsali IV, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn. Fyrireikandi tvingsilssølufundur verður týsdagin, tann 24. mars 2009 kl. 10.00.

Talan er um betonghús, ið eru bydg um- og út við handli og bakarii í niðaru hæddini. Gamli parturin av húsunum er í tveimum hæddum. Tilbygningurin, ið er úr timbri, er í einari hædd. Í kjallarahæddini er handilshøli, uml. 25m$^2$. Restin er gangur, stova og eitt annað rúm, ið bæði hava verið nýtt til skrivstovu. Eitt minni rúm hevur verið brúkt til goymslu, og eisini er eitt baðiverilsi. Húsini eru í toluligum standi og krevja ábøtur. Samlað gólvvíddin er umleið 196 m$^2$. Grundøkið er 315m$^2$.

Nærri upplýsingar um ognina og útgerð í handli og bakarii fáast frá Fríðu Patursson, advokati, Frúutrøð 4, 100 Tórshavn, tel. 353335 frp@jura.fo (j.nr. 20080985). Søluuppgerð kann umbiðast hjá navnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
tann 25/02-2009



**Hesin fitti Opel Kadett B**
**er til til sølu. Er fyrstu ferð skrásettur í august 1973 og er í sera góðum standi. Hevur einans koyrt 54.000 km. Hevur havt tveir eigarar, tann fyrra fyrstu 28 árini. Til sølu fyri 22.000 kr**
**Ringið 216409**

## Tvøroyra Klubbi til leigu

Um tú ert áhugað/ur, so er klubbin við ella uttan Suðurbio til leigu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til nevndina.

**Tvøroyrar Klubbi**

## Skrivstovuhøli søkist

Sóknast verður eftir góðum hølum til skrivstovu í Havn. Stødd uml. 40-100 m$^2$. Hølini mugu hava góð parkeringsviðurskifti og liggja væl fyri.

**Ring ella skriva til 211996 / kho@post.olivant.fo**

## Íbúð ynskist

Einsamallur maður fyrst í 60'unum, søkir hóskandi íbúð í miðstaðarøkinum.
Eri friðaligur og farið væl um.
**Ring á tlf. 211322**

## KAMAR TIL LEIGU

Kamar er til leigu í húsum í Hoydølum. Atgongd er til tvey wc/bað, køk, uppihaldsrúm og vaskirúm við vaskimaskinu og turkitrumlu.
Í húsinum er sjónvarp við televarpi og internet breiðband. Kostnaður 2.500 kr við ljós og hita. 1.500 kr í depositum.

**Ringið 584107**

i Sosialurin

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin